– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Frálík hús við panoramaútsýni í Miðvági

**Húsini eru upprunaliga bygd í 1974, men tey eru dagførd og viðlíkahildin, so tey at kalla eru sum nýggj.**









## Uttan

Húsini standa væl fyri í Vágum uttaliga í bygdini omanfyri Ellis- og røktarheimið í Miðvági. Lætt er at koma til húsini, sum standa í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Rættiliga stutt er til høvuðsveg, skúla, dagstovn og handlar. Frálíkt útsýni er út á sjógv úr køkinum, og úr stovuni sært tú inn yvir bygdina heilt inn á sandin. Uttanfyri er alt gjørt liðugt og alt er sera snøgt og lætt at halda.

## Innan

Húsini eru umbygd / umvæld / dagførd so við og við. Klædningurin, sum er viðlíkahaldsfríur, var skiftur í 2009, og 3 vindeygu eru skift – eins og øll gólvini. Køkurin er frá 2006, og allar innhurðarnar eru skiftar – undantikið 3 í niðastu hædd. Húsini eru í sera góðum standi, og ongar umvælingar eru neyðugar at gera í næstum. Alt er nýtt og hvítt og sera snotiligt, tekkiligt og stílfast. Stílurin er opin og ljósur, og rúmini eru dámlig, fjálg og hugnalig. Stóru vindeyguni geva nógv ljós, men samstundis kanst tú væl og virðiliga verða ósæddur inni hjá tær sjálvum. Innrættingin er livilig og praktiskt. Øll kunnu vera saman í felagsøkinum, men eisini vera hvør sær við sínum ítrivi og áhugamálum. Her er pláss til alla familjuna – til stóru og smáu børnini eins og til útflytingarklára tannáringin. Byrjað er at inniloka undir útitrappuni í neðra, har ætlanin er at gera ein dur, eitt rúm til oljufýringina, og eitt rúm til goymslu og frystiboks.

## Innrætting

Í ovaru hædd er inngongd, stórur durur, hjallur / kølirúm / goymslurúm, gongd, baðirúm, hjúnaðarrúm, kamar og køkur / alrúm / borðsstova / stova. Í niðaru hædd er inngongd, vásarúm, gongd / trappugongd, fýrrúm / vaskirúm, baðirúm, 3 kømur og kjallararúm við egna inngongd.

## Fakta

**Addressa:** .....Húsanesvegur 30, Miðvágur
**Byggiár:** ........1974
**Hæddir:**.........2
**Gólvvídd:**.......224m²
**Grundøki:**......426m²
**Prísuppskot:** kr. 1.200.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**